# Eins deyð annans breyð

Í donsku fyritøkuni Rambøll Olie & Gas kemur fíggjarkreppan ikki so illa við, tí nú fleiri fyritøkur repa seglini, fær Rambøll Olie & Gas kanska teir verkfrøðingar, sum felagið hevur sóknast eftir leingi, men uttan úrslit. Dan Madsen, stjóri, sigur við blaðið JydskeVestkysten, at eins og aðrar frálandafyritøkur hevur Rambøll Olie & Gas havt stóran tørv á verkfrøðingum, men nú kann fyritøkan fáa nakrar frá sínum egna dóttirfelag í Bretlandi. Tað felagið er í byggivinnuni, sum er minkað munandi í Bretlandi eins og aðrastaðni.





*Jákup Sune Lauritsen, borgarstjóri í Sørvágs kommunu, Jákup Lauritsen, flogskipari og Bogi Jacobsen, stjóri í ráðgevarafyritøkuni, Munin. Her saman við teldugjørdum myndum av nýggja flogvøllinum í Klovanum í Vágum*

*Mynd Jens K Vang*

kurvum og skurðum vit hava gjørt síggja, hvussu in nflúgvingarmøguleikarnir eru, hvussu lendið kann brúkast osfr. Sjálvur haldi eg, at hetta er ein góð verkætlan og er betri undirbygd av Munin og Rambøll enn fleiri aðrar alternativar útbyggingar.

Alt ov dýrt at umsita tveir vøllir

- So vit tosa um at sláa tvær flugur við eitt?

- Tað, sum er so týdningarmikið, tá man tosar um slíkar útbyggingar er sjálvandi, at tað kostar at byggja tvs. tað hetta kostar eina ferð. Men tað, sum tað kostar hvørt ár at reka.

Vága floghavn hvørt ár, tað er tað, sum í veruleikunum merkir nakað fyri Føroya land. Um ein flogvøllur kostar 30 mill. kr. at reka, so kostar hann tað hvørt ár. Og hava vit tveir flogvøllir, sum skulu rekast, so hava vit tvær ferðir 30 mill. hvørt ár, og tað hevur Føroya land ikki ráð til. Tí haldi eg, at ein alternativur flogvøllur, ein hjáflogvøllur ella hjábreyt til verandi vøll við verandi facilitetum gevur tað rætta til Føroya land, tí vit eru ikki so nógv í Føroyum, sum skulu gjalda alt hetta.

Sørvágur og Sørvágs kommuna er mítt hjartamál, men tað ger ikki, at man fyri landið alt eisini hevur ábyrgd fyri at gera tað rætta. Nú hevur man í so nógv ár tosað um henda og handa og hin vøllin, og tað vilja altíð vera argumentir fyri og ímóti. Men sjálvur haldi eg, at um tað er so, at vit kunnu prógva, at flogbreyt í Klovanum er ein góð loysn, so hevur synergiineffektin tvs. hjábreytin til verandi vøll ein sera stóran týdning í rakstrinum eisini, og tað haldi eg vit øll í Føroyum mugu taka við. Tað er eingin meining í at gera tveir vøllir bara fyri at gera tað.

Jákup Sune Lauritsen sigur, at tey hava verið og tosað við nevndina fyri flogvøllin og greitt teimum frá Klovaprojektinum. Málið liggur hjá nevndini fyri Vága Floghavn, sum eigur fasilitetirnar í Vágum. Hon stendur fyri útbyggingini.

- Soleiðis sum eg kundi hugsað mær tað, hóast hetta ikki liggur hjá Sørvágs kommunu, so haldi eg tað hevði verið skilabest, um man hugdi eftir hesi hjábreytini sum eitt alternativ. Og at vit kanna teir møguleikar, sum liggja í hesum projektinum og siga, at hetta er tað vit stíla móti í framtíðini. Og líkasum gevast við at tosa um allar møguligar aðrar loysnir og heldur konsentrera okkum fult út um hetta projektið, at longja verandi flogvøll og síðani at hyggja eftir hjábreytini og fáa optimal viðurskifti í Føroyum. Føroyar hava brúk fyri einum porturi út í heim, og tað er sera týdningarmikið, at tað porturið er gott.

## Gloymið Glyvursnes

- Men tað eru jú sterkar kreftir í eitt nú høvuðsstaðarøkinum at fáa ein flogvøll á Glyvursnesi so tætt upp at Havnini, har tey flestu fólkini búgva og arbeiða.

- Sjálvur haldi eg, at teinurin frá flogvøllinum til meginøkið er so mikið lítil, at tað er ikki vert at tosa um, tí tá man tosar um, hvat er økonomiskt best fyri okkara land, so er tað, at vit øll skulu gjalda. Nú er Vága Floghavn so væl fyri, vit hava ein undirsjóvartunnil, sum hevur kostað nógv, og vit hava eitt infrakervi, sum er rættiliga gott, og tí haldi eg ikki, at vit skulu tosa um at leggja ein nýggjan flogvøll aftrat her ella har. Gerið Vágoynna til flogvallaroynna burturav.

Jákup Sune Lauritsen sigur at enda, at Sørvágs fjørður er ikki poppulerur at flúgva inn í gjøgnum, tað vita vit øll, men við at gera eina hjábreyt í Klovanum, so koma vit at minka um innflúgvingarnar gjøgnum Sørvágsfjørð við eini helvt kanska. Tvs. at man kemur at brúka Klovan í teimum ringu ættunum, og á tann hátt kemur man at supplera so øgiliga væl við verandi vøll. Fólki dáma ikki væl at flúgva inn gjøgnum Sørvágsfjørð, og tá tú hevur ein nýggjan vøll eisini, hevur tú møguleika til at broyta tað so, at innflúgvingar verða gjøgnum Klovan ístaðin.